# Kovanum vantar livur

**Niðursjóðingarvirkið Kovin í Sandavági hevur gjørt sáttmála um sølu av livraúrdráttum til Fraklands, men noyðist kanska at avlýsa handilin orsakað av vantandi rávøru**

FISKIÍDNAÐUR
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Kovin í Sandavági fær sum er ikki uppfylt gjørda handilsavtalu við franska handilsketu, tí ov lítð av fiskalivur fæst í Føroyum.

Niðursjóðingarvirkið Kovin í Sandavági hevur gjørt avtalu um sølu av góðum 20 tonsum av niðursoðnum livraútdráttum til hesa fronsku handilsketuna.

Ari Thomassen, stjóri á Kovanum, sigur, at roknað varð við, tá avtalan varð gjørd, at als eingin trupulleiki fór at vera at framleiða tað, avtalað var. Hann greiðir frá, at verkætlanin í grundini byrjaði við, at Kósin og Sandoy Seafood fóru at taka í móti ókruvdum útróðrarfiski fyri á tann hátt lættari at fáa gagnnýtt innvølin, eitt nú livrina. Tí tað vísir seg, at menn meta tað ikki altíð stríðið vert at taka livrina, tá kruvt verður umborð.

Men nú er Kósin givin við verkætlanini, sigur Ari Thomassen, og samstundis er rávørugrundarlagið hjá Kovanum burtur.

Eftir stendur so Kovin við eini sølkuavtalu upp á góð 20 tons, men hevur bara kunnað framleitt eini fýra-fimm tons, sigur hann.

– Tað er sera óheppið. Partvís hava vit gjørt íløgur, hóast ikki so øgiliga stórar. Eisini noyðast vit at siga eina gjørda avtalu upp, og koma soleiðis at missa pengar. Men tað, sum upp aftur veri er, sigur Ari Thomassen, er tað, at vit so helst eisini fara at standa sum óálítandi í eygum keyparans og fáa ringt orð á okkum. Og tað kann gerast ógvuliga dýrt.

Hann sigur, at tey hava roynt at lýst við, at tikið verður í móti livur. Serliga er tað toskalivur, brúk er fyri. Men eitt nú longulivur er eisini vælkomin. Longulivur er jú tiltikin góð.

Men reaktiónin hevur verið lítil, eini fimm kilo er tað heila, tey hava fingið, síðan lýst varð, og tað ger hvørki til ella frá í hesum høpinum, sigur stjórin á Kovanum.

Hann sigur, at Kovin letur fimm krónur fyri kilo av livur. Tað er einar tvær krónur ella meira, enn til dømis givið verður í Íslandi.

Nú er tað kortini ikki so, at húsagangur er í durunum, hóast hendan avtalan fer fyri einki, sigur Ari Thomassen.

Tí í aðrar mátar er væl at gera á Kovanum í løtuni, sigur hann. Serliga eru tað rognini, sum nú væntandi fara at geva nógv arbeiði. Í løtuni arbeiða 14 fólk á Kovanum.



*Í løtuni verða rækjur til Týsklands pakkaðar á Kovanum. Lagdar í konservesdósir og niðursoðnar*

Mynd: Edvard Joensen



*Dósirnar verða fluttar eftir flutningsbandi undir eitt kar, haðani saltlaki við tilsettum smakkievni dryppar niður í tær, áðrenn lok veðru lagt á*

Mynd: Edvard Joensen

# Norrøna verður verandi í Føroyum

**Í vikuni bar danska internettíðarritið, Travel Report, tey tíðindi, at hetlendingar hava kravt, at Norrøna skal hava støð í Lerwick aftur fyri, at teir hava sett partapening í Smyril Line. Tað er tómt tos, sigur nevndarformaðurin í Smyril Line**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

– Norrøna er føroysk og fer at hava støð í Havn, sum hon altíð hevur gjørt. Annað tos má standa fyri egna rokning hjá teimum, sum siga tað, sigur Tormóður Djurhuus, nevndarformaður í Smyril Line.

Eftir nýggju vetrarferðaætlanin hjá Smyril Line fer Norrøna at leggja at í Lerwick í Hetlandi fýra ferðir um vikuna. Bæði til og úr Hanstholm og Bergen. Tað vil siga, at hon um veturin ongantíð fer at sigla milum tvær havnir, uttan onnur eitur Lerwick.

Danska tíðindaritið Travel Report skrivaði mánadagin, at hetta mátti metast sum, at Norrøna nú hevði støð í Hetlandi um veturin.

Víðari varð skrivað, at hetta komst av, at hetlendingar mettu seg sum bjargingarmenn fyri allari verkætlanini við nýggju Norrønu, nú teir hava sett pening í Smyril Line, og at teir á hendan hátt vilja hava sín part aftur.

Men hetta hevur einki við veruleikan at gera, sigur Tormóður Djurhuus, nevndarformaður í Smyril Line.

Hann sigur, at avgerðin um at lata Norrønu sigla til Hetlands, er tikin við vinnuligum útrokningum sum støði.

– Mett varð, at hetta var tað besta, sum loysti seg í hesum føri, sigur hann. Gott samband er við skotska meginlandið úr Lerwick, og leiðslan í felagnum helt, at hetta var góður máti at flyta vøru úr Føroyum inn á bretska meginlandið.

Tað er almannakunnugt, at hetlendingar eru partur av Smyril Line, men nevndarformaðurin vísir aftur, at tað hevur verið nakað krav frá teimum, at skipið skal leggja at í Lerwick.

Spurdur um, hvat varð av ætlanini um at sigla beinleiðis til Skotlands, sum tosað varð um, tá byrjað varð upp á nýggju Norrønu, svarar Tormóður Djurhus við at vísa til siglingina til Hetlands og taka uppaftur, at hetta var tað, sum leiðslan metti vera tað skilabesta í verandi støðu. Eisini hóast tað bæði kostar havnargjald í Lerwick, eins og lossing og lasting umframt tíð, tá fyrst skal leggjast upp í Hetlandi fyri síðan at flytast víðari við ferju til Aberdeen og so aftur víðari haðani.

– Men tað verður gjørt, tí leiðslan meti hetta sum skilabestu ferðaætlanina, leggur nevndarformaðurin dent á, og sigur, at tað, sum danska tíðindaskrivið segði, má standa fyri teirra egnu rokning.



*Norrøna fer eftir vetrarferðaætlanini at leggja at í Lerwick fýra ferðir um vikuna. Ætlanin um at sigla til Skotlands er slept. Men tað hevur einki við nøkur krøv frá hetlendsku partaeigarunum í Smyril Line at gera, sigur nevndarformaðurin í Smyril Line*

Mynd: Eiríkur Lindenskov



# Hugnaløta á Elisheiminum



*Eini 40 fólk vóru savnað á Ellisheiminum. Fremst er formaðurin í Vága Pensionistafelag*

**Sunnukvøldið møttust umleið 40 pensionistar í Vágum til samkomu á Ellisheiminum í Miðvági**

HUGNALØTA
*Edvard Joensen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Vágar:** Vága Pensionistafelag beyð til samkomu á Ellisheiminum í Miðvági sunnukvøldið. Ymiskt var til undirhalds og fólk høvdu tað hugnaligt.

Vága Pensionistafelag plagar at skipa fyri ymsum hugnaligum samkomum, og hendan var ein teirra. Onkur, sum við var, helt, at saktans kundu tó fleiri fólk møtt upp. Eini 40 mundu tey vera í tali, sum komin vóru saman í samkomuhøllini á Ellisheiminum.

Har var bæði fortalt og sungið, eins og prátað varð, og burturluting eisini var á skránni.

Hugo Fjørðoy í Sørvági, sum er ein av pionerunum innan føroyska flúgving, segði á samkomuni frá um hvussu tað var, tá byrjað varð at flúgva regluliga til Føroya.

Seinastu tíðina hevur stórur partur av tosinum í Vágum verið um tunnil og samband um Vestmannasund. Eisini eru framsýningar gjørdar um samferðsluna, eins og hon er lýst aðrastaðni við.

Heini F. Petersen, fyrrverandi lærari í Sandavági, var á samkomuni og greiddi frá ymiskum, sum hevði við ferðasambandið og postflutningin vestur í Vágar at gera.

Vága Pensionistafelag er við í verkætlan um at byggja eldraíbúðir í Vágum. Formaðurin í Felagskommununi í Vágum, Jónhild Jørgensen, greiddi frá hesi ætlan og møguligari útbygging av Ellisheiminum.

Sungið varð dúgliga, og bæði guitarin og harmonikan spældu undir. Eisini varð burturluting, tí sum vera man hevur eitthvørt flag, eisini pensionistafelag, brúk fyri pengum.

Einar triggjar tímar vardi hugnaløtan á Ellisheiminum sunnukvøldið, og fólk fóru væl nøgd aftur at húsum.



*Heini F. petersen greiddi frá samferðslu og postflutningi vestur í Vágar*



*Odmar Ravnsfjall spældi guitar, og Osmundur Joensen harmoniku, meðan sungið varð*



*Fanny Johannesen í Sandavági við samheftinum, sum sungið varð dúgliga úr*

HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu
Citroen Saxo 1,5D 3h
km. 120.000, grønur, jul'97
80.000,-
Citroen ZX 1.9TD 5h
km. 163.000, grønur, mai'97
85.000,-
Nissan Almera 1,4l
km. 64.000, grønur, okt'98
83.000,-
Citroen Xsara 1.9 td week
km. 77.000, gráur, okt'98
115.000,-
Suzuki Baleno 1.3i
km. 27.500, gráur, apr'00
99.000,-
Toyota Corolla 2.0d HB
km. 164.000, gráur, dec'93
61.000,-
Chrystler Voyager 2,4i (7 pers)
km. 82.000, m.reyður, 1995
105.000,-
Toyota Corolla 1.3i
km. 24.000, svartur, feb'01
103.000,-
VØRUVOGNAR
Citroen Jumper 2,5TD
km. 120.000, reyður, 1996
120.000,-
Nissan Serena 2,3D
km. 88.000, bláur, mai'97
88.000,-
Nissan Serena 2,3D
km. 102.000, bláur, mai'97
88.000,-
Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar
Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Lesið Sosialin